




# Fyrimunir við Ríkisfelagsskapinum



EDVA JACOBSEN
Sambandsflokkurin

Sambandsflokkurin er einasti flokkur, sum veruliga vil varðveita ríkisfelagsskapin við Danmark. Upp undir eitt val látast summir av flokkunum at vera sambandssinnaðir, men tá valið er av, fara teir aftur í loysingarhamin.

Fyri okkum sambandsfólk er felagsskapurin við Danmark meira enn bara krónur og oyru. Londini bæði hava verið í felagsskapi í fleiri hundrað ár, og hetta eru bond, sum ikki kunnu kvettast. Bæði kanningar í Føroyum og Danmark vísa, at fólkini í báðum londum vilja varðveita og styrkja felagsskapin millum londini bæði.

Í tí støðu, sum vit eru í í dag, hava føroyingar danskan ríkisborgaraskap, sum merkir, at vit kunnu virka á jøvnum føti við danskarar í Danmark. Hetta kom sera væl við hjá okkum í kreppuárunum, tá umleið 15 % av okkara landsmonnum leitaðu sær til Danmarkar at fáa arbeiði, tí tað ikki var møguligt at fáa arbeiði í Føroyum.

Vit kunnu fara niður til Danmarkar at fáa okkum eina útbúgving , og í dag fara umleið 90 % av øllum føroyingum, sum fara uttanlands at lesa, til Danmarkar. Lesandi føroyingar í Danmark fáa lestrarstuðul og fáa eisini íbúðarstuðul, sum ger, at leigan verður bíligari. Tær ungu barnafamiljrnar fáa eisini eykastuðul fyri hvørt barnið. Hetta er við til at gera, at tað eisini eru góðir møguleikar hjá einari familju við børnum at fara til Danmarkar í lestrarørindum.

Á sjúkrahúsøkinum hava vit eitt fyrimyndarligt samstarv við Ríkissjúkrahúsið, tá ið sjúka rakar onkran av okkara. Danmark hevur eitt vælútbygt sjúkrahúsverk, sum vit hava stóra gleði av.

Nógvir av okkara yvirmonnum eru á brúnni ella í maskinrúminum á skipunum í tí danska handilsflotanum.

Tað er ógvuliga ilt at meta um, hvussu nógvir føroyingar búgva í Danmark í dag, men tað eru nógv túsund. Vit vilja ikki slíta bondini við okkara landsmenn í Danmark.

Onnur viðurskifti knýta okkum at danska samfelagnum. Á mangan hátt hava vit felags søgu og mentan. Navnframir danskarar sum Grundtvig, Brockman, Brorson, Ingeman og Bech hava havt stórt árin á okkara samfelag, sum hevur verið gagnligt fyri Føroyar

Umframt alt hettar eru eisini nøkur felagsmál, millum annað uttanríkismál, verjumál og løgreglumál, bert fyri at nevna nøkur, sum ríkismyndugleikarnir enn umsita fyri okkum, og eru hesi mál væl umsitin. Hesi mál eru ikki knýtt at heildarveitingini sum í dag er umleið 634 milliónir, men verða goldin umframt.

Alt hettar vil Sambandsflokkurin hava eitt gott samstarv um.

Vilt tú varðveita ríkisfelagsskapin, sum er við til at gera, at Føroyar framhaldandi vera eitt gott vælferðarsamfelag fyri øll, har tryggleikin verður settur í hásæti, so er tað bara Sambandsflokkurin, sum kann hjálpa tær við hesum.

# Framskygdur eldrapolitikkur raðfestast frammarlaga



INGEBORG GODTFRED
Tjóðveldi

Tað er í tøkum tíma at tilrætta eldrapolitikkin fyri tey næstu nógvu árini. Tey gomlu hava vánaligar umstøður, og tær fara alsamt at versna, um vit einki gera nú.

**Skulu vit gleða okkum at blíva gomul í Føroyum?**

Nógv verður gjørt at fáa føroysku hagtølini fyri fólkaheilsu og livialdur so góð sum møguligt, sum t. d. at betra um fólkaheilsuna sum heild, og sitandi landstýrismaður í heilsumálum Hans Pauli Strøm eigur tøkk fyri tey tiltøk, hann hevur sett í verk.

Men stóri spurningurin er so, um tað verður gjørt nóg mikið og nóg gott **fyri tey eldru í Føroyum**, t.v.s. tey yvir 67 ár. Verður nóg mikið av peningi sett av á eldrapolitiska økinum, soleiðis at tørvurin hjá teim eldru verður nøktaður? Verður t.d nóg mikið gjørt, so tey eldru kunnu vera so leingi sum gjørligt í egnum heimi? Eru nóg nógv røktar- og sambýlispláss allastaðni í Føroyum? Ella stutt sagt:

Skulu vit sum eru í mínum aldursbólki, gleða okkum at gerast gomul í Føroyum?

Um eg hevði farið út á gøtuna at spyrja mín aldursbólk, eri eg stórliga bangin fyri, at svarið er NEI, tí støðan hjá teim gomlu í dag í Føroyum er í nógvum førum ikki "heilsuliga og tilfeingisliga ráðilig", sum tað so vakurt stendur á heimasíðuni hjá Nærverkinum. Á heimasíðuna hjá Tórshavnar kommunu stendur at lesa, at tey hava ætlanir um at byggja nýtt røktarheim til 24 fólk, samstundis sum tann akutti tørvurin er 100 røktarheimspláss í Suðurstreymi.

Í dag eru 12% ella 5.755 fólk í Føroyum yvir 67 ár (kelda: Hagstova Føroya-)og hesin aldursbólkur verður ikki minni í bræði, samstundis sum tað verða færri og færri hendur (fyri tað mesta KVINNUhendur) at hjálpa hesum aldursbólki, so her verður tørvur á at hugsa ørðvísi.

Vit mugu ansa eftir, at útbygt verður eftir tørvi og ikki eftir politiskum ambitiónum.

Vit mugu gera tað meira spennandi at arbeiða á hesum øki, og vit mugu virða hetta øki - kvinnuøki- nógv meira.

Vit mugu hyggja eftir, um okkara skipanir eru ov stirvnar?

Vit mugu hugsa um tað privata vinnulívið kundi spælt einhvønn leiklut á hesum øki, soleiðis at tey eldru fáa meira sjálvræði á, hvørja hjálp teimum tørvar og hvat tey ynskja og møguliga vilja gjalda sjálvi.

Nei, vit gleða okkum ikki at blíva gomul í Føroyum undir verandi umstøðum, men vit í Tjóðveldi, vilja gera tað væl betur.

Vilt tú? Eg vil!

# Ja, nú er aftur rok gjørt við fríum vilja av teimum, ið sita sum toppar



GERHARD LOGNBERG
Løgtingslimur
Javnaðarfloksins

Jú, Strandferðslan skuldi hava tveir skiparar til "Smyril", tí teir, sum hava balst á hesum fjalum nú í nógv ár, hava nátt pensjónaldur, also hava nátt 67 ár.

Mitt í øllum kemur tann politiski leikparturin og samtykkir, at hesin menn, sum hava ført hetta skip í nógv ár kunnu halda fram til teir eru 70 ár.

Men hvat ger toppurin á Strandferðsluni, teir tveita hesar menn til síðis og nærum siga, at teir eru óbrúkiligir ella hvat er tað man meinar. Hatta er langt úti.

Hvat ger leiðslan hjá Strandferðsluni, eg spyrji meg sjálvan, eru hesi fólk, sum sita á toppinum á Strandferðsluni úti eftir at knúsa stovnin? Fyri mær sær tað soleiðis út.

Teir ganga framvið stýrimenninar, sum eru umborð. Hetta meti eg sum grovan ágang ímóti teimum væl kvalificeraðu stýrimonnunum, sum eru settir í starv umborð.

Hetta meti eg, sum skitið arbeiði og eina háðan, ið møtti sínum egnu.

Nú var hetta frammi í Tinginum við einum fyrispurningi har tingmenn fingu ein minutt í part, og sá eg ongan møguleika, at útdýpa eitt so vítt fevnandi mál, sum hetta, í ein minutt. Tí skrivi eg.

Hvør var setanarbólkurin til hesa starvsetan? Hetta eru fólk, sum halda lítið um sínar egnu stýrimenn ella hevði setanarbólkurin fingið harra boð áðrenn? Um so er, ja, so hava teir lítlan týdning. Um so er, kemur forfylging fram um rættvísi.

Tann meinigi maðurin fær illa eyga á feilin Jacob Vestergaard hevur gjørt. Um meiningin hjá Jacob var at verja fólkið, sum arbeiðir hjá stovninum, har meini eg stýrimenninar, so eri eg samdur við honum, tað sum setanarbólkurin hevur gjørt er at gera split á sínum egna arbeiðsplássi, so eg fari so staðiliga at heita á teir leiðandi, at geva ast við revolvara politikkinum, tí so satt, sum rættvísi livir, kemur hetta tykkum sjálvum aftur um brekku.

Mitt í øllum seta tit skiparar, sum koma uttanífrá og so sanniliga halda tit eisini hesar menn fyri gjøldur. Skilja tit ikki tað? Tit leita eftir trupulleikum á Strandferðsluni í staðin fyri at royna semju, so seta tit fólk upp ímóti hvørjum øðrum.

Jú, stjórin á Strandferðsluni legði kongin sjálvur, helst skuldi meginparturin av setanarbólkinum hjá Strandferðsluni gjørt tað sama, ella onkur annar gjørdi tað fyri teir.

Slíkan vemmiligan ágang, sum Strandferðslan førir ímóti sínum egnu, skalt tú leita leingi eftir.

Tú skalt helst langt út um Norðurlond, helst har, sum fólkaræði er eitt ókent orð.

Jú, hetta hendir í Føroyum. Strandferðslan háðar teir stýrimenn og skiparir, sum hava ført hesa stoltu skútu, og Strandferðslan háðar teir vælkvalificeraðu, sum søktu uttanífrá.

Eg vil til seinast siga soleiðis, at eg ætli at berjast fyri rættvísi, tí hetta er ikki tað, sum líkist rættvísi.

Eg kann skoyta uppí um ein av kokkunum á "Teistanum". Hvat ger leiðslan við henda mannin? Kokkurin, sum helt seg hava fingið starv. Maðurin býr í Sandoy, heima á Sandi. Jú, uttan nakað varð "Arnason" tveittur til síðis av eini eirindarleysari Strandferðslu. Hvør ger so við ein ungan familjumann? Eingin við virðing fyri sær sjálvum, men vælsaktans er ikki síðsta orðið sagt.

Um hetta mál varð sett sum misálit á landsstýrismannin, Jacob Vestergaard, so hevði eg ikki stemmað fyri at felt landsstýrismannin. Men hevði viljað, at tað vóru onnur høvd, sum rullaðu.

Við sorgblídni

# Hví ikki gera tað ókeypis at ferðast um Skopunarfjørð?



JENIS AV RANA
Miðflokkurin

Ímynda tær, tá tunnil er komin undir Skopunarfjørð. Tá fara hvørki bilar ella ferðandi at gjalda annað enn tað, vit øll gjalda yvir skattarokningina fyri m.a. vegir, brýr og tunnlar. Men sum er, noyðist ein vanlig familja, búsitandi í Sandoynni, at hugsa seg meira enn einaferð um, áðrenn tey fara av oynni. Ferðaprísurin er ov høgur, eisini eftir at hann herfyri varð lækkaður.

Meina vit nakað við at verja útjaðaran, so er her ein upplagdur møguleiki at vísa tað. Lat okkum gera tað ókeypis at ferðast til útoyggjanar- ein teirra er Sandoyggin.

Men hvør skal gjalda undirskotið, sum tá verður, spyr tú ? Svarið er einfaltey somu, tú og eg, sum, tá tunnlin er liðugur, gjalda avdrátt og rentur av honum. So hví ikki byrja nú?

Tað hevði verið ein útrætt hond til Sandoynnaog hinar útoyggjanar, sum sjálvandi eiga at fáa sama tilboð.

Útjaðarapolitikkur í verki, meðan vit bíða eftir tunnlinum!